Nýggi nevndarformaðurin í Atlants Kolvetni:

# Vil skapa felagnum trygga

**-Avbjóðingin hjá okkum uppá stytri sikt er at syrgja fyri at stilla felagið soleiðis, at vit um eitt til tvey ár hava eitt felag, sum øðrumegin svarar hvørjum sítt men sum samtíðis eisini hevur kapital til at vera við í framhaldandi oljuleiting. Vit eru farin í arbeiðsklæðini og arbeiða nú miðvíst og stig fyri stig fyri at skapa felagnum eina góða og trygga framtíð sigur nýggi nevndarformaðurin í Atlants Kolvetni, Birgir Durhuus. Hann hevur vónir um, at tað fer at eydnast. Sosialurin hevur tosað við hann.**




*Birgir Durhuus, nevndarformaður í Atlants Kolvetni uttan fyri skrivstovuna hjá felagnum í Havn.*

*Mynd: Jan Müller*

OLJUFELAG

*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Føroyka oljufelagið Atlants Kolvetni hevur verið fyri stórari menning men hevur seinastu tíðina eisini ligið tungt í sjónum. Til tess at tryggja felagnum eina góða framtíð varð helvtin av nevndini skift út herfyri, og broytingar vórðu eisini gjørdar í leiðsluni. Nýggi oddamaðurin í felagnum eitur Birgir Durhuus og arbeiðir hann dagliga sum fíggjarfrøðingur hjá Danske Bank. Vit spurdu Birgir Durhuus, hvussu bar tað til, at júst hann gjørdist nevndarlimurognevndarformaður í Atlants Kolvetni?

-Tað byrjaði við, at eg fekk eina áheitan, um eg hevði áhuga fyri at koma í nevndini. Eg skilti, at tað høvdu verið broytingar í felagnum. Atlantic Petroleum hevði verið eitt felag, sum hevði leitað eftir olju í mong ár, og í fjør rakti felagið við olju og byrjaði at heinta hana upp úr undirgrundini. Tvs. at man fer frá at vera eitt leitandi felag til eisini at vera eitt framleiðandi felag. Tað var so eisini mett vera rætt at seta nýggjar avbjóðingar til nevndina í felagnum, og tí varð ynski um at gera broytingar. Eg varð so spurdur, um eg vildi vera ein av teimum nýggju nevndarlimunum, og tað segði eg ja til. Eg eri upprunaliga fíggjarmaður, og hini bæði, sum blivu vald í nevndina, starvast innan oljuvinnuna. Og Birgir Durhuus heldur fram:

## Fokusøki og førleikar

-Skal eg síggja alt hetta eitt sindur uttanífrá, so haldi eg, at hetta at nevndin umskipar seg og at man velur lutvíst ein fíggjarmann og tvey oljufólk gevur sjálvandi eisini nøkur signal til framtíðina um, hvat felagið vil. Tað er eingin ivi um, at uppá heilt stutt sikt verður fokus sett á tað fíggjarliga, og tað er kanska eisini orsøkin til, at eg varð valdur til nevndarformann. Men hyggja vit eitt sindur longur fram, so vóna vit, at tað verður líka nógv fokus uppá olju og oljuleiting. Tá verður leikluturin kanska enn størri hjá oljufólkunum í nevndini, enn hann er í dag.

-Kunnu teir mongu føroysku og útlendsku partaeigararnir kenna seg tryggari, nú helvtin av nevndini er skift út?

-Nú veit eg ikki, hvussu teir kendu seg áðrenn. Men eg vil siga, at henda nýggja nevndin hevur í hvussu er nakrar førleikar til at røkja tær uppgávur, sum eru fyri framman. Um teir eru betri ella verri enn hjá teimum, sum vóru áðrenn, má vera upp tey ymisku at meta um. Man kann eisini siga, at her fer at ganga sjón fyri søgn. Man fer rættiliga skjótt at síggja, hvussu gongur við nýggju nevndini. Nevndin er longu farin til arbeiðis, og tað verður heldur ikki so leingi til ítøkilig úrslit hjá nevndini fara at síggjast.

-Men hvat kann henda nýggja nevndin fáa meira burtur úr enn tann undanfarna?

-Sammetingar eru ómøguligar at gera hjá mær. Tí eg havi ongar fortreytir fyri at meta um arbeiði hjá gomlu nevndini. Eg kann bara fyrihalda meg til, hvat tann nýggja nevndin fer at útinna.